# Havnar Timburhandil keypt goymslubygning

**Sunda Kommuna hevur selt goymslubygningin niðri við keiøkið til Havnar Timburhandil. HT ætlar at nýta bygningin sum timburgoymsla til tann stóra viðin. Soleiðis hava teir møguleika at nýta goymsluhølini í Havn meira effektivt**

KEYP OG SØLA
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

HT hevur júst keypt ein goymslubygning frá Sunda kommunu. Nýggi goymslubygningurin liggur í Hvalvík.

- Talan er um eina stóra tóma høll, sum vit fara at nýta sum timburgoymsla. Vit ætla okkum at goyma stóran við inni í høllini. Høllin er næstan líka stór sum ein ítróttarhøll, siga tey frá HT.

Havnar Timburhandil hevur seiinastu tíðina vaksið munandi um virksemið, men høllin er ikki beinleiðis avleiðing av økta virkseminum:

- Nýggja timburgoymslan ger, at vit kunnu brúka goymslurnar í Havn øðrvísi. Soleiðis kunnu vit nýta hølini hjá okkum meira effektivt. Tá ið tann stóri viðurin er fluttur út, verður lættari at skipa vøruna, sum kann koma beinleiðis út í handilin. Sum nú er, er ikki arbeiðsligt inni í goymsluni, tí at tað liggur so nógvur stórur viður og sløðist, sigur Jørmann frá HT.

Tað eru ongar ítøkiligar ætlanir um, hvat tað leysgivna plássið skal nýtast til, men tað gevur fleiri møguleikar til timburhandilin.



*Havnar Timburhandil hevur keypt goymslubygningin í Hvalvík frá Sunda Kommunu. Bygningurin er tann nærri á myndini.*

*Mynd Rólant Waag Dam*

# Gracia Burnham bergtikin av landinum og fólkinum

**Føroyaferðin hjá Graciu Burnham er av á hesum sinni. Møtini hjá henni hava verið sera væl vitjað. Umfram at tala, hevur Gracia eisini fingið tíð at hildið frí, og hon hevur millum annað sæð grindadrápið í Gøtu**

TRÚBOÐARAVITJAN
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Gracia Burnham fór av landinum í gjár. Hon hevur vitjað Føroyar og hildið møtir ymsastaðni. Hon er fyrrverandi trúboðari á Filipinunum, har ið hon varð tikin fangi av yvirgangsbólkinum Abu-Sayaf. Hon varð hildin fangi í eitt ár, áðrenn hon megnaði at flýggja. Maðurin hjá Graciu doyði av skotum, tá ið hon slapp leys.

Jógvan Zachariassen hevur saman við Ólavi Jøkladal skipað fyri Føroyaferðini hjá Graciu. Hann sigur seg vera væl nøgdan við vitjanina hjá henni:

- Vit eru øgiliga glaðir fyri vitjanina. Møtini vóru sera væl vitjað. Tað var fult í øllum samkomuhúsunum, sum hon talaði í. Tá ið hon talaði í ítróttarhøllini á Eiði, vóru 700 fólk komin at lurta eftir henni. Tað var ein sera breiður áhoyraraskari til møtini, sigur Jógvan.

**Geva íblástur til missión**

Jógvan Zachariassen heldur, at tað er týdningarmikið at fáa fólk, sum hava uppliva okkurt til Føroya, tí at tey kunnu læra okkum nakað:

- Gracia hevur upplivað nógv, og hon kann veruliga læra okkum nakað. Hon kann hjálpa fólkum, sum kenna sorg. Eg veit, at tað eru nógv, sum hava fingið okkurt burturúr vitjanini hjá henni.

- Eitt annað endamál við vitjanini er, at geva føroyingum íblástur til missión. Vit síggja sjálvandi ikki virkningin beinanvegin, men vónandi eru nógv vorðin uppmuntrað av henni, sigur Jógvan Zachariassen.

Gracia Burnham segði á tíðindafundinum í Miðlahúsinum, at hon eisini ætlaði sær at halda frí í Føroyum, og hon vónaði, at Føroyar kundi geva henni nakað. Jógvan sigur, at hon var eisini væl nøgd við vitjanina.



- Gracia fekk møguleika at hitta tey, sum hava biðið fyri henni, tá ið hon var fangi á Filipinunum. Tað var stórt hjá henni. Hon hevur eisini verið runt í landinum. Vit hava verið frá Enniberg til Akraberg. Eisini hevur hon sæð grindadráp í Gøtu. Afturat tí hevur hon roynt tann føroyska matin. Hon er veruliga bergtikin av landinum og fólkinum, sigur Jógvan Zachariassen at enda.

## FJARÐAROK í Luftina

Í morgin hósdagin 10. august kl. 15.15 fer sendingin Fjarðarok í luftina á Rás 2.

Vertar í sendingini verða teir báðir, Eyðun Jacobsen og Terje Vestergaard, sum eisini eru kendir frá sendingini Krossfeltið, sum var at hoyra seinasta vetur, eisini á Rás 2.

Sendingin fer at snúgva seg um Fjarðafestivalin, og tað verður prátað við fyrireikararnar og nøkur av føroysku luttakarunum á skránni. Umframt hetta verður eisini tónleikur frá bólkunum at hoyra. So snara teg inn á Rás 2 hósdagin og hoyr, hvat fjarðafestivalurin hevur at bjóða.

*- JJ*

## Tjalding á Fjarðafestivalinum

Tjalding er eftirhondini vorðið ein obligatoriskur partur av einum festivali, og nú bjóðar Fjarðafestivalurin eisini tjaldingarpláss.

Fjarðafestivalurin hevur við stórari vælvild frá hagastýrinum í Skálafirði fingið eitt ógvuliga náttúruvakurt og væl egnað pláss til tjaldingina, beint norðanfyri festivaløkið. Prísurin fyri tjalding er 150 kr. fyri hvørt tjaldið.

Tað ber til at tekna seg til tjalding á www.fjardafestival.com

## Rætting

Í Sosialinum í gjár var eitt ummæli av framførsluni hjá barnakórinum Dropar á Summarfestivalinum. Í greinini stendur, at Sigrið Rasmussen stjórnar kórinum, men hetta er ikki rætt. Tað er Sigrið Sivertsen, ið stjórnar barnakórinum.

Vit biðja lesaran halda okkum til góðar og umbera fyri mistakið.